## Myrdu tólv løgreglufólk

Meksikanska løgreglan fann í gjár líkini av ellivu monnum og einari kvinnu tætt við ein veg í landspartinum Michoacan. Tað vísti seg, at talan var um tólv løgreglufólk, og tað sást, at tey høvdu fingið ringa viðferð, áðrenn tey vórðu skotin. Myndugleikarnir ivast ikki í, at tað er rúsevnaharkaliðið "La Familia", sum hevur beint fyri teimum tólv, og at drápini eru hevnd fyri, at myndugleikarnir hava tikið ein oddamann hjá harkaliðinum. Meksikanski forsetin, Felipe Caldron, segði í gjárkvøldið, at myndugleikarnir fara at herða bardagan ímóti rúsevnaharkaliðunum. 36.000 hermenn hjálpa løgregluni í bardaganum.



## Friður í 60 dagar

Í Nigeria hevur tann størsti uppreistrarfelagsskapurin boðað frá, at hann fer at binda frið teir næstu 60 dagarnar sum samsýning afturfyri, at myndugleikarnir hava latið leiðaran í felagsskapinum leysan. Uppreistrarfelagsskapurin hevur skipað fyri einari røð av álopum á nigeriska olju- og gassútbúnaðin, og álopini hava rakt nigerisku oljuvinnuna sera meint. Felagsskapurin sigur, at oljufeløgini gera sær dælt av nigeriska fólkinum og landsins náttúruríkidømi, og at tað nigeriska fólkið er fyri vanbýti. Nú felagsskapurin hevur lýst frið í 60 dagar, vónar hann at fáa orð á stjórnina um viðurskiftini, skrivar Reuters.

# Álop brýndi Luis



**- Sum tíðin er liðin, eri eg vorðin klókari og meira búgvin. Serliga eftir hendingina á Tinghúsvøllinum. Eg tími ikki at øsa meg um rasistiskar útsagnir og velji ongantíð at loysa trupulleikarnar við harðskapi. Tað gjørdi eg ofta fyrr. Tað loysir seg ikki, og tað hevur ongantíð loyst seg, sigur Luis Osorio Lützen, sum altíð hevur havt trupulleikar at drigist við sum myrkur í Føroyum**

HARÐSKAPUR

*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Hann stendur og skimast. Klubbagarðurin er á tremur við fólki. Tað er sunnumorgun, kalt, og náttarstøðini hava latið dyrnar aftur. Vinfólkini eru horvin í mannamúgvuni. Hann hyggur runt, men finnur ongan. Við eitt tekur hann avgerð um at fara til hús. Men á veg út úr garðinum verður hann steðgaður. Tríggir ungir mans taka harðliga í hann.

- Hvat helviti gert tú her, tín nekari?

Drongurin hyggur bilsin at teimum, meðan hann framhaldandi verður háðaður. Hann er einsamallur. Men finnur seg ikki í tílíkari viðferð. Hann mutar ímóti.

- Eg havi eins góðan rætt og tit at vera her, svarar hann teimum aftur.

Og nú kókar yvir. Hann verður drigin oman á Tinghúsvøllin. Bukaður. Sligin. Sparkaður. Skorin í andlitið.

> *Eg góðtaki ikki rasismu, men eg góðtaki, at eg ikki kann broyta tað*

- Tín nekari! Slepp tær av helviti til! Eru seinastu orðini.

Avhølvaður og skelkaður. Púra einsamallur á Tinghúsvøllinum. Og hann veit ikki, hvørjir harðskapsmenninir eru.

> *Eg verði sera lætt dømdur. Og tað veit eg, at tey allar flestu, ið eru øðrvísi í Føroyum, verða*

### Mentalt knústur

Tað er hálvt triðja ár síðani, at Luis Osorio Lützen vegna sín húðarlit varð avbukaður á Tinghúsvøllinum. Eitt harðskapsmál, ið vakti miklan ans í miðlunum, og sum enn eina ferð íbirti kjak um rasismu í Føroyum.

Men heima við hús í føroyska høvuðsstaðnum sat ein myrkur drongur, sum er ættleiddur úr Kolumbia, og hugdi at.

- Eg var fullkomiliga í knúsi mentalt. Og tað tók langa tíð, til eg kom fyri meg. Eg var eisini rúkandi óður fyrstu vikurnar, og eg var sannførdur um, at allir